## Arbeiðsloysið í USA metstórt

Hagtøl hjá amerikanska hagtalsstovninum fyri juni mánað vísa, at arbeiðsloysið kom upp á 6,4 prosent seinasta mánaðarskiftið, og so stórt hevur arbeiðsloysið í USA ikki verið seinastu níggju árini. Hetta er fyrstu ferð síðani í apríl í 1994, at arbeiðsloysið hevur verið so stórt.

Í mai var amerikanska arbeiðsloysið 6,1 prosent, men myndugleikarnir væntaðu tá, at tað fór at minka tann næsta mánaðin. Gongdin hevur tvørturímóti verið tann øvugta, og eftir einum mánað eru 30.000 arbeiðs-pláss farin.

Talsmaðurin hjá George W. Bush, forseta, Ari Fleischer, sigur, at forsetin er ørkymlaður av tí stóra arbeiðsloysinum, og at tað framvegis veksur, men at forsetin hevur álit á, at tann stóri skattalættin fer at venda gongdini í búskapinum á røttu kósina.

## Dýrt at dálka

Fyri fýra árum síðani misti norska farmaskipið "Star Eviva" 87 tons av olju í havið úti fyri amerikanska havnarbýnum Charleston í Suður Carolina, og nú hevur reiðaríið fingið boð um at gjalda 18 milliónir norskar krónur í bót og endurgjaldi.

Kanningar hjá amerikansku myndugleikunum hava avdúkað, at eingin var í maskinrúminum, tá óhappið hendi, og at leki var á rørskipanini umborð. Tað vísti seg eisini, at fráboðanartólini, sum skulu boða frá lekanum, virkaðu ikki, og at bæði skiparin og reiðaríið vóru vitandi um tað um brekið.

Í rættinum í Charleston mátti reiðaríið, Grieg Shipping og William Hansen í Bergen, viðganga, at tað var vitandi um brekið við fráboðanarskipanini, og reiðaríið góðtók tí bótina og endurgjaldskravið. Skiparin og maskinstjórin á "Star Eviva" fingu sekkin beint eftir óhappið.

## Gróvu lík uppaftur

Fleiri fyrrverandi heryvirmenn í Kili viðganga nú, at teir góvu boð um at grava fleiri lík uppaftur og at fjala tey. Talan var um politisk andstøðufólk, sum hernaðarstýrið hjá Augusto Pinochet beindi fyri.

Meiri enn 3.500 fólk hvurvu undir hernaðarstýrinum, sum hevði valdið í Kili frá 1973 til 1990. Andstøðufólk hava leingi havt illgruna um, at hernaðarstýrið royndi at fjala øll prógv um politisk morð, stutt áðrenn tað legði frá sær. Fyrr hevur stjórnarherurin viðgingið, at umleið 2.000 lík vórðu søkt í Kyrrahavið, og nú viðganga átta fyrrverandi herovastar illgerðina.

Millum teir átta eru fleiri av teimum fremstu leiðarunum í gamla hernaðarstýrinum, teirrr millum Cesar Benavides, sum var innanríkisráðharri, Carlos Forestier, sum var næstovasti í herinum og Herman Brady, sum var verjumálaráðharri. Næstan 200 fyrrverandi kilskir heryvirmenn eru skuldsettir fyri morð og annan ágang undir hernaðarstýrinum, og 14 teirra eru dømdir. Tann 87 ára gamli Pinochet varð eisini ákærdur, men ákæran varð tikin aftur, eftir at landsins hægstirættur kom til ta niðurstøðu, at hann er ov gamal og sjúkur til rættarsókn.

## Nógvir norðmenn arbeiðsleysir

Um mánaðarskiftið stóru 91.800 norðmenn skrásettir sum arbeiðsleysir, og tað svarar til 3,9 prosent av teimum arbeiðstøku.

Arbeiðsloysið er at kalla tað sama sum í mai, men samstundis meiri enn ein fjórðing størri enn fyri einum ári síðani. Størsta arbeiðsloysið er norðuri í Finnmørkini, men hagtølini vísa, at vøksturin í arbeiðsloysinum hetta seinasta árið er galdandi í øllum landinum.

Uppgerðin vísir eisini, at arbeiðsloysið veksur í at kalla øllum yrkisbólkum. Men størsta arbeiðsloysið er í teimum landspørtunum, sum hava serliga nógv ídnaðarvirkir og teimum landspørtunum, sum eru serliga tengd at fiskivinnu og fiskiídnaði, skrivar Aftenposten.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Bush leyp framav



*-Lat teir bara koma, segði Bush um iraksku mótstøðuna í Irak. Teir næstu tímarnar fullu tíggju amerikanskir hermenn. Her fer ein amerikanskur jeepur upp í royk í Bagdad hósdagin*

**Amerikanski forsetin hevur verið fyri hvøssum atfinningum, tí hann fyrr í vikuni bjóðaði iraksku mótstøðumonnunum av. Nú sigur talsmaður forsetans, at forsetin meinti tað ikki.**

IRAK
*Árni Joensen*

- Lat teir bara koma. Vit hava nóg mikið av hermonnum til at taka sær av teimum.

Soleiðis segði George W. Bush, forseti, mikudagin, tá hann varð spurdur, hvussu USA ætlaði at steðga teimum áhaldandi álopunum á amerikansku hermenninar í Irak. Men hann skuldi ongantíð havt sagt hetta.

- Tíðin er komin, til at forsetin sigur at gevast við sínum cowboy-tosi, segði demokratiski leiðarin Dick Gephardt, og fyrrverandi amerikanskir heryvirmenn hildu tað vera ovboðið, at forsetin eggjar fíggindanum til at søkja at amerikansku hermonnunum í Irak. Sum forseti er Bush ovasti fyri amerikanska hervaldinum, og fyrrverandi heryvirmenninir gjørdu vart við, at soleiðis hevur eingin annar amerikanskur forseti tosað.

Iraksku mótstøðubólkarnir tóku eisini av avbjóðingini hjá Bush, og teir næstu tímarnar doyðu tíggju amerikanskir hermenn í álopum ymsastaðni í Irak, meðan uppaftur fleiri vórðu særdir. Tað fekk talsmannin hjá forsetanum at kunngera, at forsetin meinti ikki tað, sum hann hevði sagt.

- Ætlan forsetans var sjálvandi ikki at eggja til fleiri álop, segði Ari Fleischer.

# Framtíðarsamfelagið krevur fleiri brúkaragjøld til at fíggja vælferðarsamfelagið

**Útreiðslurnar til almanna- og heilsuverkið í Danmark fara at veksa nógv í komandi árum, samstundis sum pensjonistarnir gerast meiri og meiri múgvandi. Tí kann tað gerast neyðugt við fleiri brúkaragjøldum, heldur ein danskur professari. Í hvussu er verður neyðugt við nýhugsan.**

BRÚKARAGJØLD
*Árni Joensen*

Seinastu mánaðarnar hava politikarar í londum sum Noregi, Fraklandi, Týsklandi og Italia tosað um, at tað verður neyðugt við munandi broytingum í tí vesturevropeiska vælferðarsamfelagnum fyri at standa ímóti teimum stóru útreiðslunum, sum broytingin í fólkasamansetingini fer at krevja í komandi árum. Allastaðni er gongdin tann sama: Talið á eldri fólki veksur skjótt, samstundis sum færri og færri verða á arbeiðsmarknaðinum at fíggja vælferðina.

Danmark sleppur heldur ikki undan hesari gongdini, og ein framrokning, sum nakrir óheftir búskaparfrøðingar hava gjørt, vísir, at verður samfelagsmynstrið í dag flutt fram til 2040, høvdu 97 milliardir krónur vantað í teimum almennu kassunum. Sjúkrahúsini høvdu havt brúk fyri 17 milliardum krónum afturat, sjúkratryggingini hevði vantað seks milliardir, og til heimahjálp og aðra umsørgan hevði verið tørvur á 16 milliardum krónum afturat.

Samstundis vísir framrokningin, at viðurskiftini hjá teimum donsku pensjonistunum fara at broytast nógv. Í ár hava 70 prosent av pensjonistunum í Danmark 125.000 krónur í ársinntøku, men í 2040 fer ávirkanin av arbeiðsmarknaðarpensjónunum at vísa seg av álvara, soleiðis at tá fara næstan helmingurin av teimum donsku pensjonistunum at hava meiri enn 200.000 krónur í inntøku um árið.

Kjeld Møller Pedersen, professari á Syddansk Universitet, sigur við Berlingske Tidende, at tølini í framrokningini eru sera áhugaverd, og hann heldur, at tað er neyðugt við øðrvísi hugsanum fyri at fáa javnvág í teir almennu kassarnar.

- Sum heild noyðast vit at umhugsa, um tað yvirhøvur ber til at fíggja ta almennu vælferðina við skattinum, ella um vit noyðast at nýta fleiri brúkaragjøld. Sum er gjalda brúkararnir ein fimtapart av útreiðslunum á heilsuøkinum, og tann skipanin kann eisini nýtast á øðrum økjum sum eitt nú til heimahjálp. Spurningurin fer at stinga seg upp, sama um politikararnir vilja tað ella ikki, sigur Kjeld Møller Pedersen.



# Vanlukkur skulu kannast




*10 tær mest álvarsligu vanlukkurnar hvørt ár skulu kannast, sigur Ráðið fyri Ferðslutrygd*

**Ráðið fyri ferðslutrygd mælir til at seta eina skaða-/eftirlitsnevnd, sum skal kanna tær mest umfatandi vanlukkurnar í føroyum.**

FERÐSLA
*Rógvi Borðoy*

Tilmælið er partur av Nullhugsjónini, sum er sprottin í Svøríki fyri nøkrum árum síðani. Null-hugsjónin sigur, at vit skulu arbeiða fram ímóti at eingin skal doyggja ella fáa álvarslig mein í ferðsluni.

Jón Kragesteen, dagligur leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sigur, at nevndin skal líkjast havarí-kommissiónunum, vit kenna frá flogvanlukkum. Men at í hesum førinum skulu umleið 10 tær mest umfatandi vanlukkurnar kannast.

Álitið, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur gjørt, sigur, at hagtøl eru alneyðug fyri at fáa eina ábending um, hvar størstu trupulleikarnir eru í ferðsluni. Løgreglan, sjúkrahúsverkið og aðrir stovnar hava hagtøl viðvíkjandi ferðsluvanlukkum, men teirra tøl eru gjørd við øðrum endamálum enn at fyribyrgja.

- Tí eru tølini ikki brúki lig hjá okkara stovni, sigur Jón Kragesteen.

Ráðið fyri Ferðslutrygd vil tí hava øll hagtøl samskipaði og savnaði íu einum stað.

### Bileftirlitið kannar longu

Tær mest álvarsligu vanlukkurnar verða kannaðar á Bileftirlitinum longu nú. Kanningarnar umfata fyri tað mesta tekniskar feilir, sum eru atvoldin til vanlukkurnar.

- Vit fara ikki at filla bilin sundur fyri at kanna hann, um man kann siga tað, sigur Jákup Jacobsen, leiðari á Bileftirlitinum.

Hann sigur, at teir kanna til dømis róðurskipanina, bremsuskipanina og tílíkt. Kanningarnar verða gjørdar við tilmæli frá løgregluni, um hon metir, at tað kann vera ein tekniskur feilur, sum er orsøkin til vanlukkuna. Kanningin hjá bileftirlitinum skal staðfesta ábyrgdina av vanlukkuni, og ikki finna útav hvørjar ávirkanir hava skapt vanlukkuna av fyrstan tíð. Vanliga biður løgreglan um eina kanning av einum parti av bilinum, sigur Jákup Jacobsen.

Jón Kragesteen sigur, at kanningarnar ikki eru eftirfarandi, tí tær eru av so fakligum slagi.

Hann heldur fram, at vit hava uml.100 politistar í Føroyum, og nógvir teirra eru ikki vandir við hetta slagið av kanningum. Av tí sama verða nógvir feilir yvirsæddir, sum vant fólk hevði sæð.

### Ikki nokk

Jón Kragesteen sigur, at tað als ikki er nóg mikið at kanna teknisku atvoldirnar til vanlukkurnar.

- Tað eru fleiri síður í einari vanlukku. Tann tekniski og tann læknaligi eru umráðandi at hava í huga, men har er eisini tann sálarligi, sum kann hava minst líka nógv at siga, sigur Jón Kragesteen.

Sum dømi nevnir hann, at bilførarin kann hava verið í sálarligum trupulleikum.

Endamálið við biltúrinum kann eisini hava týdning.

– Alt skal kannast, sigur Jón Kragesteen.

### Politiskur vilji skal til

Fyri at kunna røkka málinum við ongum deyðum ella álvarsliga løstaðum í ferðsluni, er neyðugt, at politiski viljin er til staðar at loysa uppgávuna. Í tí sambandi kann nevnast, at Vinnumálaráðið hevur fingið sent álitið frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, og síðani er tað sent út til hoyringar.

- Vit hava sent tað til kommunurnar, løgregluna og onnur, og tey hava so fingið freist til hálvan august at koma við aftursvari, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum situr við ferðslupolitikki.

- Burtur úr svarinum skal so setast saman eitt uppskot, heldur hann fram.

Samanumtikið heldur Bjarni Djurholm, at tiltakið er gott, men hann sigur eisini, at neyðugt er at hugsa seg um.

- Tað má vera samsvar millum hugsjónina og veruleikan, sigur hann.

Um undirtøka er millum stovnarnar, sum hava fingið álitið sent, dugir Bjarni Djurholm ikki at síggja, at nøkur forðing skal vera fyri at uppskotið skal ganga ígjøgnum. Men hann sigur, at tað kann taka tíð.

- Nevndin í vinnumálaráðnum, sum arbeiðir við málinum, verður liðug um umleið eitt ár, sigur Bjarni Djurholm.

### Føroyar ov seinar

Í formansfrágreiðingini hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd fyri 2000-2001 varð m.a. sagt, at

- ...vit standa eftir við skommini, sum eitt av teimum fáu londunum, ið als ongan ferðslupolitikk hava.

Um undirtøka verður fyri álitinum, er líkt til, at hendan skommin skjótt fer í søguna.

**Fakta**

**Hetta metir Ráðið fyr Ferðslutrygd vera størstu vandamálini:**
- Ov ungir, óroyndir førarar
- Gongufólk, sum verða koyrd yvir
- Vantandi nýtsla av bilbelti

**Tilmælið sigur m.a.:**
- At ein Skaða-/eftirlitsnevnd skal setast
- At hon skal kanna allar álvarsligar vanlukkur
- At nevndin hevur eftirlit við tiltøkunum, hon ætlar at fremja
- At nevndin ger eina ársfrágreiðing um arbeiði sítt
- At alt viðkomandi hagtalstilfar frá undanfarnu árum verður savnað

# 100.000 í bót

**Skiparin á norska línubátinum Seir fekk mikudagin 2. juli bót eftir at Agdlek kannaði lastina**

LÍNUSKIP
*Rógvi Borðoy*

Sjóverjuskipið Agdlek fór umborð á norska línuskipið Seir fyri at halda eftirlit. Tað vísti seg, at lastin ikki var skipað eftir teimum nýggju reglunum.

### Sundurskilt

Eftir nýggju reglunum hjá norskum línubátum, skulu fiskasløgini haldast sundurskild, so Fiskiveiðieftirlitið lættliga kann staðfesta, um ov nógv er fiskað av hjáveiði.

Seir lá og fiskaði við Føroya Banka, tá Agdlek legði at. Fiskurin ikki var skildur sundur og tí kundi Agdlek ikki føra eftirlit við hvussu nógv var fiskað av hvørjum fiskaslag.

Skiparin tók við sektaruppskotinum áljóðandi 100.000 krónur. Hann hevur í dag stillað trygd fyri teimum 100.000 krónunum, og tí slapp hann at halda fram við fiskiskapinum á føroyska økinum.